# Hósdagur 26. september

**SVF**

17.30 Viftan
18.00 Toktummas
18.05 Pocahontas 21:26
18.30 Atlantis High 4:13
18.55 Kærleiksvenjing - donsk sending fyri ung
19.15 Eitt arbeiði fyri meg e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Upprunin til menniskjað 8:8
22.15 Krimitímin: Burturi á heiðini 1:3 - bretsk krimi
23.05 Borð um borð e
23.55 Liðugt

**EUROSPORT**

07:30 Golf: Challenge Tour - African Tournaments Review
08:00 Sailing: Sailing World
08:30 Motorsports: Series
09:00 Grand Touring: 2002 Series Japan Gt Championship Motegi
09:30 Pool: World 8 Ball Pool Championships In Shetland Islands, Scotland
11:00 Cycling: World Track Championship Denmark Copenhagen
11:30 Cycling (Live): Tour Of Spain
16:30 Tennis (Live): Wta Tournament Leipzig Germany
18:00 News: Eurosportnews Flash
18:15 Cycling (Live): World Track Championship Denmark Copenhagen
20:45 Boxing: International Contest
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Formula 1: Inside Formula
22:45 Sumo: Grand Sumo Tournament (Basho)
23:45 Superbike: Superbike Mag
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 TLZ: »Renaissance – The End of the Renaissance«
1.00 TLZ: »Copland's America«
2.00 TLZ: »Jonathan Miller's Opera Works – The Chorus«
2.45 TLZ: »Lesley Garrett Tonight«
3.15 TLZ: »Inside Dot Coms – usa.com«
4.00 TLZ: »Informer, Eduquer, Divertir«
4.25 TLZ: »Pause«
4.30 TLZ: »Cinema for the Ears«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Ordering a Meal«
5.30 Look Ahead
6.00 Bits & Bobs: »Harvest«
6.15 The Story Makers: »Special Occasions«
6.35 Angelmouse
6.40 Dinosaur Detectives: »What did the Dinosaurs eat?«
7.05 Blue Peter flies the World: »Spain/Fiesta«
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders: »Horsham«
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms: »Winchester«
10.15 Vets to the Rescue
10.45 Hetty Wainthropp Investigates: »How Time flies«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders: »Halifax«
14.00 Going for a Song
14.30 Bits & Bobs: »Harvest«
14.45 The Story Makers: »Special Occasions«
15.05 Angelmouse
15.10 Dinosaur Detectives: »What did the Dinosaurs eat?«
15.35 Blue Peter flies the World: »Spain/Fiesta«
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Gardeners' World
18.30 Ground Force: »Lancashire«
19.00 Eastenders
19.30 Dog Eat Dog
20.30 People like us: »The Actor«
21.00 The Blackadder: »The Archbishop«
21.35 French and Saunders
22.05 Attachments: »Plug and Play«
23.00 The Sculptress

**BBC WORLD**

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Simpson's World (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Simpson's World (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 The Comeback Cars (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Developing World
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:10 Tv-Shop
08:50 Tv3 Extra
09:20 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Ricki Lake
12:50 Familien Walton
13:50 Din Heldige Hund
15:35 Med På Moden
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Sabrina - Skolens Heks
18:30 Tv3 Extra
19:00 Dawsons Creek
19:50 Den Eneste Ene
20:50 Sex And The City
21:30 Mysterious Ways
22:30 Line's
23:30 Tv3 Extra
00:00 Ti Tommelfingre
00:30 Walker Texas Ranger
01:25 Simpsons
01:55 Træneren
02:25 Ricki Lake
03:15 Ti Tommelfingre
03:45 Sunset Beach
04:35 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Jóna Thomsen á Strondum lesur
07.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Jóna Thomsen á Strondum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Faktor fimm (e) - Lættur summartónleikur hjá Gunnari Nolsøe
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e) - Jákup Magnussen stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
16.00 Tíðindi
16.03 Aftur á gamlar slóðir - Ferðafrásøgn úr íslandi. 3. og seinasta sending. Jógvan Arge leggur til rættis
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
18.00 Barnaútvarpið - Vit fara at spæla tónleik fyri børn.
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Upplestur
19.30 Krás - Tónleikasending hjá James Olsen
20.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi

## Pocahontas




Pocahontas, ið fór á eina langa ferð um alt Amerika við tí endamáli at hitta øll indiansk ættfólk at greiða teimum frá tí boðskapi, sum skaparin í fyrndini boðaði Hopi-fólkinum er nú aftur á skránni. Hósdag og leygardag í Sjónvarpi Føroya.

## Din heldige hund




Ein millióningur letur sína ogn fara til sín hund og ein hundapsykolog, meðan familja hjá tí farna ikki far eitt klov í oyra.

Hesin skemtifilmur fylgir kampinum hjá familjuni um rættindini til teir eftirlætnu pengarnar ... og hvat tó fylgir við!

**ÚF**

## Morgunlestrar

**23.–28. september**

***Jóna Thomsen á Strondum lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 23. september:**
nr. 267 "Eg veit, hvar góð er grundin"
nr. 274 "Gev mær treyst og trú í treytum"

**Týsdagin 24. september:**
nr. 330 "Yndislig, føgur"
nr. 345 "Alt í føðurhendi er"

**Mikudagin 25. september:**
nr. 270 "Kúra og klaga"
nr. 269 "Hvat er tað, sum tyngir sinnið"

**Hósdagin 26. september:**
nr. 271 "Eg fátækur snúgvi mær faðir"
nr. 276 "Miskunna mær, Guð"

**Fríggjadagin 27. september:**
nr. 272 "Ivi í huga tungur er"

**Leygardagin 28. september:**
nr. 540 "Almikið árið líður"
nr. 393 "Guð faðir meg vara"

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:30 Ynskiløtan - Heilsanir frá lurtarum. Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
16:00 Indie - Bylgjan - Tónleikasending sum Rúni Korsgaard leggur til rættis
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Andaligur búnaðskapur (4. partur av 8) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar – eftir C.H. Spurgeon
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Absalonsen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum (e)
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar – eftir C.H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana
Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379.
00.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
02.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna v/ Símun Absalonsen gestur Jógvan Zachariassen
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
06.00 vit gevast



# ...um átta minuttir fer Másin avstað

HUGLEIÐING

*Ása undir Kletti*

Eg havi verið úti í Svínoy. Nakrar dagar í juli fóru vit — saman við góðu vinfólkum okkara — út til Svínoyar at ferðast. Hetta vælsignaða pláss — andarholið, sum ber av øllum. So dánt, tú hevur sett fótin á land, fer pulsurin niður, tú andar djúpan, og strongd og onnur óhumska fer við lýggja lotinum út móti Draganum og hvørvur sum døggdropi fyri sól. Undurfult.

Størsta hending á degnum er, tá Másin kemur við ferðafólki. Hvør er við henda túrin? Og hvør er farandi? Jú, vit hava ov mikið at gera við at kaga út gjøgnum vindeygað um morgnarnar, tá vit svøvnpískut koma niður av loftinum inn í køkin at fáa okkum ein bita. Hetta er ongantíð áðrenn kl. 10.00! Eingin grund til at skunda sær.

Tá tú soleiðis fert at ferðast "í egnum landi", so má ferðin fyrireikast væl og virðiliga. Tú kanst ikki bara fara avstað. Nei, nei. Her krevst ein neyv tilrættalegging, sum stendur mát við, tá amerikumenn ætla sær upp á mánan!

Fyrst skal vikan/dagurin veljast – nær fer Másin – fer hann einaferð ella tvær ferðir út til Svínoyar, dagin, vit hava kosið okkum at ferðast hagar. Eingin grund til at fara avstað á hálvari nátt, um sleppast kann undan tí.

So skulu tær innleiðandi venjingarnar viðv. matinum gerast. Hvussu nógv verða vit? Hvussu nógvar dagar vera vit harúti? Hvussu nógvar døgurðar skulu vit keypa? O.s.fr. Seti góðu vinkonu míni stevnu hjá handilsmanninum, tá vit hava avgjørt at fara mikudag seinnapartin. Deiligur dagur mikudagur. Soleiðis mitt ímillum tvey vikuskifti. So fer at rigga væl at vera harúti til sunnudagin.

Mikumorgunin verður farið til handils, og vit fylla vognin við alskyns døgurðamati, eplum, rísi, grønmeti, breyði, viðskera, skipskeksum (tað er tað mest umráðandi), og so einari rúgvu av góðgæti. Hetta sær væl út — ikki ov nógv at dragsa við okkum út hagar. Vit meta, at her eru einar tríggjar hampuliga stórar ítróttartaskur. Tað eiga vit at klára. Vit hava eisini verið henda túrin so ofta, at nú vita vit, hvat vit skulu hava við okkum. (Gera vit nú tað?)

Avtalað er, at konurnar og børnini fara í einum bili, meðan menninir, viðførið og hundarnir fara í einum øðrum! Tilsamans fara 8 fólk, tveir hundar, 1 lítil súkkla, ein klappvognur og 14 onnur kolli til Svínoyar henda fagra mikudagin. Og nú havi eg ikki talt ryggsekkir og aðrar taskur uppí. Tað var ikki sørt, at grannarnir øtaðust, meðan vit stúvaðu og bóru inn í bilarnar — hildu kanska, at vit fóru med alla! Á ja, gloymdi at nevna, at tá vit vóru komin oman ímóti Studentaskúlanum, vendu menninir aftur — teir høvdu gloymt eitt løbihjul! (Nú eru 15 kolli umframt tað leysa).

Leiðin norður til Leirvíkar gekk sum eftir ánni – vit spældu The Beatles og sungu og murraðu við eftir besta førimuni – til vit komu á Leirvíkskei – tá var eingin murring meira. Har stóðu eitt ótal av treylarum og bilum – tað var ikki hugsingur um, at bilarnir sluppu við henda túrin. Vit vóru farin alt ov seint heimanífrá. Spyr ikki hví – lat tað fara, men eitt er vist – vinkonan undir liðini á mær skifti andlitslit nakrar ferðir! Hon visti óivað nakað, eg ikki visti!

Hvat var nú til ráða at taka. Skjótt skuldi berast at – báturin fór um skamma stund, og fyrst skuldi avráðast, hvør skuldi við og hvørji kolli! Aftaná stutta samráðing varð avrátt, at konurnar og børnini skuldu fara við Dúgvuni, og garparnir (eitt av mínum yndisorðum) skuldu so koma dagin eftir við (næstan) øllum dragslinum og.... hundunum. Sum teir so fittir søgdu í felag: "Kvinnur og børn fyrst".

Nú var bara eitt at gera og tað var at finna taskuna við blæum, mikudagssuppuna og onkrum øðrum og so avstað umborð. Borgarstjórin í Svínoy, Pól, sum fekk sín bil við umborð henda túrin, sá okkara "dilemma" og var so beinasamur at koyra okkum útvalda viðførið til Hvannasunds og fáa tað umborð á Másan. Stak fittur maður, Pól.

Nú var at renna fyri lívinum og skunda sær umborð. Komin at sita í salongini, var vinkonan við at fáa vanliga dæmið aftur. Hetta, at vit báðar, saman við børnunum, sótu umborð á Dúgvuni á veg til Svínoyar var eitt slag av "Deja vu" – nú var bara at vóna, at Másin ikki fór á víkina! Vit báðar hava mangan tosað um túrar, har Másin, hetta deiliga far frá 1959, er komið í "clinch" við opna havið við okkum umborð. Blæur hava flotið aftur og fram á dekkinum, saman við Anders And bløðum og skipskeksum. Børn og vaksin hava spýð, og sjórokið hevur staðið himmalhøgt. Og menninir? Eisini ta ferðina komu teir dagin eftir í besta veðri, og sjálvandi var eingin trupulleiki at leggja til á Eiðinum.

Nú var bert at seta seg afturá í salongini og njóta eitt Mars ella bæði tvey á veg til Klaksvíkar. Í Klaksvík er ruta av bryggjuni beinleiðis til Hvannasunds. Nýtt steðgipláss er beint uttanfyri dyrnar hjá Kunningarstovuni, og har stóðu vit so og bíðaðu so tolin saman við øðrum góðum fólki, sum skuldu til Fugloyar.

Við gamla busssteðgiplássið á horninum stóð ein riðil av børnum, men tað gáaðu vit ikki um, fyrr enn "okkara" bussur steðgaði júst har! So var bert eitt at gera — skunda okkum oman at fáa okkum sess. Ryggsekkir og børn uppá pláss og so at renna. Kendi meg eina løtu sum Garbage í filminum hjá Chaplin "The Great Dictator", tá Garbage vegna Hinky skuldi taka ímóti Mussolini á tokstøðini, og tokið koyrdi aftur og fram á perrongini. Stuttligt. Her vóru tað vit, sum runnu aftur og fram frá einum busssteðgiplássi til hitt. Ikki so stuttligt..

Ná. Endiliga komu vit til Hvannasunds og so umborð á Másan. Viðførið var uppá pláss, veðrið av tí allarfagrasta, so eingin vandi var fyri, at vit fóru á víkina. Fugloyarfjørður er lumpisligt farvatn – sær út sum deyðavatn, men kókar beint undir vatnskorpuni. Gav at bíta, tá dótturin knappliga fekk karm. Havi hug at rósa manningini. Teir vóru um okkum alla tíðina, so eingin kendi seg ótryggan. Fjálgaðu um ommusonin, sum fyri fyrstu ferð skuldi til Svínoyar.

Og hvussu við okkara kæru húsbøndrum, er tað kanska onkur tykkara sum spyr. Jú. Tað skal eg so væl siga tykkum. Veit ikki, um gandur var uppií, men annar teirra meiðslaði sær fingurin so illa umborð á Dúgvuni, at hann mátti á skaðastovuna í Klaksvík. Eftir slíka hending er gott at sessast í fjálgari matstovu hjá góðum vinmanni og fáa sær ein bita. Á ja.

Og morgunin eftir, tá teir komu út við Másanum, gjørdi annar hundurin ikki mætari enn at leypa á bláman. Varð við bit og slit bjargaður umborð aftur. Gandaðir? Góður spurningur.

Nú er uttan iva onkur, sum heldur, at vit gera okkum lívið alt ov trupult. Hví ikki fara við tyrluni? Bert 10 minuttur og vit standa í Svínoy. Einki stríð og næstan eingin beran og dragsan.

Vóru vit farin við tyrluni, vóru ongar stuttligar og øðrvísi upplivingar á túrinum: Eingir Beatlessangir at lurta eftir í bilinum, einki Mars at seta tenninar í umborð á Dúgvuni, eingin voffur fyri borð á Eiðinum (heldur álvarsligt) - og heldur eingin grein skrivað. So einfalt er tað.

Og við tyrluni risikerar mann eisini at verða gloymdur eftir umborð!

## MC Hár skal verja borg í Klaksvík

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*

MC Hár fer at spæla fyri fyrstu ferð nakrantíð í Klaksvík fríggjakvøldið. Teir spæla í Borgini, sum fyrrverandi Lognbrá nú verður kallað

MC Hár hevur verið nógv frammi seinastu árini, teir hava givið sangir út á fløgu, teir hava spælt á alskyns konsertir, men hóast hetta hava teir ongantíð vitjað í Klaksvík. Higartil.

– Vit gleða okkum ótrúliga nógv til at sleppa til Klaksvíkar at spæla, hetta hevur verið ætlanin í nógv ár, men tað er ongantíð lukkast at fáa tað í lag, sigur Niels Uni Dam, sangari í bólkinum.

– Tá vit góvu "Framvegis uttan vit" út í 1998, fingu vit at vita frá plátufelagnum Creative Music, at fløgan seldi væl á trimum støðum, hetta var í Suðuroynni, í Havn og í Klaksvík. Í Havn hava vit spælt eitt ótal av ferðum, í Suðuroynni spældu vit í summar, og skulu aftur leygarkvøldið, so nú manglar Klaksvík, sigur hann.

### Elska klaksvíkingar

Fríggjakvøldið koma teir provokerandi tónleikararnir úr høvuðsstaðnum umsíðir til Klaksvíkar at spæla. Teir fara at spæla í Borgini, sum er í KÍ-høllini.

– Tað er eisini for galið at vit ongantíð hava spælt í næst størsta býnum í Føroyum. Vit í MC-Hár elska klaksvíkingar, ja, so nógv at ein av okkum er giftur við einum klaksvíkingi.

– Vit gjørdust eisini ordiliga heitir um hjarta, tá ein klaksvíksbólkur í seinastu Prix kapping segði seg hava okkum sum tónleikarligar fyrimyndir, sigur Niels Uni.

### Gingið væl

Tað er gamla Lognbrá, sum tey nú rópa fyri Borgin. Tað er tónleikafelagið Sjey00, sum saman við KÍ stendur fyri tiltøkunum í Borgini.

– Vit hava havt dansitiltøk fleiri vikuskifti á rað, og undirtøkan hevur verið góð, sigur Ólavur Simonsen, skrivari í Sjey00. Felagið vónar at fáa inntøkur burtur úr tiltøkunum í Borgini, sum skulu brúkast at keypa ljóðanlegg.

Fríggjakvøldið verður tað tó felagið Lognbrá, sum stendur fyri ljóðinum, tá MC Hár fer at spæla.

## Samstarvsyvirlýsing

TÍÐINDASKRIV

– millum Inuit Ataqatigiit, Tjóðveldisflokkin og Vinstrihreyfingina - grænt framboð.

Undirritaðu formenn í teimum trimum flokkunum í Útnorði, sum hava samhaldsfesti og umhvørvispolitikk í sínum stevnum, vátta hervið viljan hjá okkara flokkum at samstarva og styrkja bondini millum okkara flokkar og tjóðir. Hetta verður at fremja við m.ø. hesum stigum:

1. At skipa fyri fundum - í minsta lagi árliga - millum leiðslurnar í flokkunum til tess at viðgera felags áhugamál og at menna samstarv okkara.
2. At bjóða floksumboðum á landsfund hvør hjá øðrum og til onnur tiltøk av felags áhuga.
3. At virka fyri øktum samstarvi millum ungdómsfeløg í flokkunum og at stuðla og eggja ungdómi til at hittast at skifta orð um politiskar hugsjónir og visiónir.
4. At arbeiða í felag - úti sum heima - til tess at samskipa og tryggja áhugamálini hjá tjóðunum í Útnorði.

Flokkarnir eru samdir um at leggja serligan dent á hesi samstarvsøki:

- Sjálvsavgerðarrættur og fullveldi tjóðanna
- Verjupolitikkur
- Uttanríkispolitikkur
- Altjóða samhaldsfesti
- Mannarættindi og -skyldur
- Sosialmál og vælferðarmál
- Lokal menning og økismenning
- Umhvørvismál og burðardygg troytan av náttúrutilfeinginum
- Mentan og verju av tjóðarmálum og tjóðararvi

Undirskrivað í Nuuk, september 2002

Vegna: Inuit Ataqatigiit: Josef Motzfeldt

Tjóðveldisflokkin: Høgni Hoydal

Vinstrihreyfingina - grænt framboð: Steingrímur J. Sigfússon